

# Innihald


4 Heimshøvini verða súrari

6 Toskur og makrelur í vistskipanarligum meldri

12 Tíðarseriur

14 Merkja sjófugl fyri at kanna, hvar hann heldur til um veturin

17 Makrelur gýtir enn í føroyskum øki

18 Lýsing av hugtøkum í tilmælinum

19 Tilmælið um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í fiskiárinum 2014-2015

27 Støðan hjá toski, hýsu og upsa

28 Stovnsrøkt

29 Stovnsmeting í stuttum

30 Soleiðis góðskumetir ICES stovnsmetingarnar

32 Havstovan beint inn í stovuna

36 Lutakast millum fiskamerkir

37 Verkætlanir á Havstovuni

42 Rakstur 2013

43 Ritgerðir 2013

45 Fyrilestrar 2013

47 Postari 2013



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Sjóvarmál 2014

Lagt til rættis: Havstovan | Ritstjórn: Hanna Elina Djurhuus, Lise Helen Ofstad og Dagunn H. Jógvansdóttir Clementsen | Satsur og uppseting: Havstovan | Prent: Føroyaprent | Útgáva: Havstovan 2014 | Kápumynd: Lundi verður mátaður, Brynhild Næss Sørensen | Tað er gaman í at nýta tilfar úr ritinum, um bert keldan verður upplýst | ISBN 978-99918-831-4-4

Oddagrein

# Náttúrunar ríkidømi og spælireglur

Føroyar eru vælsignaðar við einum stórum og ríkum havøki, ið ger, at vit, í mun til fólkatalið, kunnu teljast ímillum heimsins ríkastu tjóðir. Ríkidømið verður støðugt endurnýggjað og kann geva ovurnógv av sær, eisini til komandi ættarlið. Einasta fortreyt er, at náttúrunar spælireglur verða virdar. Jú betur vit vita, hvussu vistskipanirnar í okkara havøki virka, tess nærri kunnu vit koma tí størst møguliga burðardygga avkastinum. Men um náttúran hinvegin verður eyðrænd, gerst hon kørg.

Við teimum stóru tøkniligu møguleikunum, sum vit í dag ráða yvir, er skjótt at eyðræna náttúruna, um vit ikki ansa væl eftir. Vit hava skyldu til at hugsa langsigtað, og tað er ein vanlukka fyri land og fólk, um vit einans taka stutttíðar atlit. Hetta er eisini andin í lógini um vinnuligan fiskiskap, har tað m.a. er ásett, at dentur skal leggjast á at „varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðilig og búskaparliga“.

Umsitingarliga ber til at býta okkara havtilfeingi upp í tveir høvuðspartar: Landgrunnin, har Føroyar einsamallar umsita tilfeingið, og opnu havleiðirnar, har tilfeingið er felags við onnur lond, og verður umsitið í felag. Tann parturin, sum Føroyar umsita einsamallar, verður í høvuðsheitum reguleraður við fiskidøgum. Við einum ávísum tali av fiskidøgum í hvørjum skipabólki, skal tann parturin, sum verður veiddur úr stovnunum um árið, ikki vera størri enn eitt ávíst. Fiskifrøðiliga verður arbeitt við hugtakinum „veiðutrýst“ í hesum sambandi.

Síðani skipanin bleiv sett í verk fyri 18 árum síðani, hevur næstan altíð verið avlop í fiskidøgum, og tí hava dagarnir ikki havt stórvegis regulerandi virknað. Í vánaligum tíðum minkar veiðutrýstið ofta, og seinasta fiskiár var veiðutrýstið á toska- og hýsustovnarnar ájavnt við langtíðarmálið. Tá Havstovan mælir til minking í fiskidagatali, er tað m.a. fyri at tryggja, at veiðutrýstið ikki verður ov stórt, tá góðir árgangir vónandi fara at seta til. Tað er ein fortreyt fyri, at fiskurin nær at vaksa seg stóran og búnan til at gýta nýggjar góðar árgangir.

Í trá við lógina um vinnuligan fiskiskap, hevur Havstovan mælt myndugleikunum til at draga inn teir dagarnar, ið lupu av. Annars aktiverast teir, tá góðir árgangir seta til, við tí úrsliti, at veiðutrýstið fer upp um tað, sum er langtíðarmálið – umframt at ov nógvur smáfiskur verður veiddur. Men Føroya Løgting valdi ikki at fylgja hesum tilmæli.

Torført er at koma til aðra niðurstøðu enn at meirlutin av Løgtinginum/samgonguni er ikki komin hartil, at talið av fiskidøgum skal avmarka, hvussu stórur partur verður veiddur av okkara høvuðsbotnfiskastovnum um árið. Luftin í skipanini ger, at stovnarnir sveiggja meira enn gott er, við tí úrsliti at botnfiskiflotin koyrir alt ov tungt fíggjarliga.

Mær kunnugt, er Føroyar einasta landið í okkara parti av heiminum, ið umsitir sínar heimligu stovnar á slíkan hátt. Samstundis eru hesir stovnar nógv verri fyri enn tilsvarandi stovnar í grannalondum okkara.

Havstovan fæst við nógv annað enn stovnsmetingar og tilmæli. Meginparturin av arbeiðinum á stovninum er gransking í evnum, ið geva nýggja vitan um hav, vistskipanir og tilfeingi. Vitan, ið bæði upp á styttri og longri sigt kann gera okkum før fyri at røkja og heysta okkara náttúrugivna ríkidømi á besta møguliga hátt.

Í hesum riti kann lesast um ein lítlan part av tí arbeiði, sum Havstovan fæst við. Hetta fevnir um stovnsmetingar og ráðgeving, umframt regluligar kanningar av havfrøði, æti, fiski og øðrum livandi verum og vistfrøði. Havstovan er eisini við í nógvum verkætlanum og kanningum, og ógjørligt er her at greiða frá teimum øllum. Flestu av teimum eru fíggjaðar uttan fyri játtanina á fíggjarlógini til Havstovuna. Á síðu 37 til 41 sæst eitt yvirlit yvir hesar verkætlanir.

Sum fiskivinnutjóð hava Føroyar fyri neyðini ein stovn, sum við gransking á hægsta altjóða stigi støðugt fær nýggja vitan til vega um okkara náttúrliga ríkidømi; men høvuðsamboðið, rannsóknarskipið, versnar í hvørjum. Tað er til stóran fyrimun fyri fiskivinnutjóðina Føroyar, um Havstovan fær nýtt og tíðarhóskandi skip, umframt betri fíggjarligar umstøður til at framleiða nýggja vitan, ið kann vera vinnuni og samfelagnum at gagni.

*Eilif Gaard, stjóri*